Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni K. Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Fast track-skipanin seinastu tíðina

Spurningar:

1. Hvussu nógvar umsóknir eftir fast track-skipanini vóru í mars og apríl 2023?
2. Hvussu nógvar umsóknir eftir fast track-skipanini vóru í mars og apríl 2024?
3. Hevur nakar óvanligur toppur verið á fast track umsóknum seinasta árið?

Viðmerkingar:
Í miðlunum um dagarnar og í umrøðu annars hevur verið nevnt, at arbeiðsgevarar møguliga hava fingið útlendsk starvsfólk, sum ikki eru partar av fakfeløgum, til landið og í starv beint fyri verkfallið.

Fyri fáa at greiðu á, hvussu ítøkiligu umstøðurnar hava verið, verða omanfyri nevndu spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 22. mai 2024

Eirikur í Jákupsstovu